# Framsýning í Oslo av føroyskari bjarging

## Myndir frá dramatisku bjargingini av russisku manningini umborð á Mekanikk Tarasov í 1982, tá skiparin sýtti fyri hjálp, eru at síggja í Oslo í hesum døgum

FRAMSÝNING

*Turið Kjølbro*

Í sambandi við, at ljóskastarin er settur á Ísland, Grønland og Føroyar í Oslo í heyst, sýnir vágbingurin Rógvi Johansen, sum er undir útbúgving sum myndamaður í Århus, fram myndir frá lívinum sum fiskimaður á føroyskum línubáti á Flemisch Cap við Foundland. Framsýningin, sum er á Galleri IS Kunst í Leirfallsgata í Oslo, er býtt sundur í tvey. Ein partur av framsýningini vísir lívið umborð á Sigurfarinum, meðan hin parturin er myndir frá dramatisku bjargingini av manningini um borð á sovjettiska bingjuskipinum Mekanikk Tarasov. Sovjettiska skipið kom í havsneyð eina ódnarnátt í februar í 1982. Kapteinurin á bingjuskipinum sýtti fyri at taka ímóti hjálp frá øðrum enn sínum egnu, og fór tí á botn saman við skipinum. Restin av manningini leyp á bláman. Sigurfarið bjargaði 24 monnum, harav bert fimm yvirlivdu. Trettan menn komu ikki afturíaftur.

Sovjettiska hjálpin kom meiri enn eitt døgn ov seint. Tá var manningin umborð á Sigurfarinum í ferð við at føra tey, sum yvirlivdu og deyðu starvsfelagar teirra, umborð á eitt kanadiskt sjóverjuskip. Rógvi Johansen, sum tá bert var 17 ára gamal, greiddi soleiðis frá í Sosialinum í februar í ár.

- Teir, sum yvirlivdu, høvdu tað jú heilt ræðuligt. Vóru ræðuliga kaldir og skelkaðir. Vit gjørdu alt fyri at fáa lív í teir aftur, fingu teir í turr klæðir, gníggjaðu hita í teir og góvu teimum heita súpan. Tað hevur jú verið ræðuligt hjá teimum at sæð vinir og starvsfelagar liggja lík alla staðni, men vit royndu at spara teir fyri tað, og máttu tí goyma líkini ymsa staðni. Minnist eina ferðina messudrongurin skuldi eftir eplum har frammi í skipinum. Eg hevði verið messudrongur á fyrsta túrinum, og tí bað hann meg koma við sær eftir eplunum. Vit máttu gleiva upp um fleiri lík fyri at sleppa framat eplunum.



*Rógvi Johansen sýnir fram myndir, hann tók fyri 20 árum síðani, febr. 1982, á Galleri IS Kunst í Oslo*

### Heiðrað

Á Norðoyastevnu í 1982 legði Sigurfarið at bryggju í Klaksvík. Á kajini var stúgvandi fult av fólki, hornorkestrið spældi og røður vórðu hildnar. Frá Klaksvíkar kommunu fekk manningin heiðursbræv. Seinni kom heiðursbræv frá russisku sendistovuni í Danmark. Heiðursbrævið og heiðursmerki til hvønn einstakan kom frá ovastu sovjettini.

At uppliva ein slíkan lagnutúr seytjan ára gamal, festir seg fast og varandi í minnið.

- Tað var ein ógvuliga óhugnaligur og ræðuligur túrur fyri okkum umborð á Sigurfarinum, men nógv ræðuligari fyri russarnar, greiddi Rógvi Johansen frá.

Eftir minniliga túrin á vetri í 1982, var Rógvi Johansen fleiri túrar við Sigurfarinum.

Framsýningin frá dramatisku bjargingini hevur verið sýnd í hølunum Photo Av í Viby í Århus í februar.

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Gudny Langgard, Bournemouth í Ongland, gudny78@msn.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Lesandi í Onglandi

Fleiri og fleiri føroyingar velja at fara uttan um Norðurlond at útbúgva seg! Eg eri sjálv lesandi í Bournemouth í suður Onglandi. Eri byrjað upp á mítt næsta ár á Bournemouth University og fara at greiða eitt sindur frá, hvussu tað er at vera lesandi her, eitt sindur um býin, ið eg búgvi í og um mentanina her.

Um ein hugsar um at lesa í Onglandi, er fyrsta stigið sjálvandi at søkja um at sleppa inn á skúlan og hetta er ikki nakað, ið einans tekur nakrar tímar. Tað krevur bæði nógva tíð og orku. Tískil er ráðiligt at byrja nóg tíðliga við at fyrireika seg. Í Onglandi skal man søkja áðrenn 15. desember. Hetta er rættuliga tíðliga, samanborið við Norðurlondini, men haraftur ímóti fær man svar longu í januar/februar, so man hevur meira tíð upp á at fyrireika seg.

Tá ið man er sloppin inn á eitt universitet, fær man samstundis pláss á einum skúlaheimi. Í Bournemouth er eitt skúlaheim á universitetinum, eitt mitt í býnum og eitt við strondina. Eg valdi tað mitt í býnum, ið eg havi verið ógvuliga glað fyri. Íbúðarumstøðurnar í Ondlandi eru avgjørt nógv lægri enn í Norðurlondunum, men tað venur man seg við. Í suður Onglandi er leigan á einum skúlaheimi einar 3.000 kr. um mðr. Fert tú norðureftir er leigan lægri og í London er hon hægri.

Bournemouth University er eitt rættuliga stórt universitet. Her eru eini 14.000 næmingar og rættuliga nógv av teimum eru international. Í mínum fyrsta ári búði eg saman við fólki frá 5 ymiskum londum. Hetta hevur persónliga verið bæði mennandi og spennandi. Á skúlaheiminum verða tey internationalu koyrd í íbúðir fyri seg og tey ensku fyri seg. Hetta helt eg vera eitt sindur undarligt í byrjanini, tí tá man fer til Onglands fyri at lesa, vil man eisini gjarna læra ta ensku mentanina. Tað var tó ikki nógvir tímar, fyrr enn tað var mær greitt, hví hetta bleiv gjørt. Tá ið onglendingar fara á universitet, eru teir umleið 18 ára gamlir og er tað vanliga fyrstu ferð, at teir flyta heimanifrá – hetta ger, at teir ganga í býnum hvørt kvøld, ganga lítið og einki í skúla, larma og bróta mest møguligt. Leggjast kann tó afturat, at teirra hugsan vanliga broytist eftir fyrsta árið.

Bournemouth liggur sum sagt í suður Onglandi, við Ermasundið. Tað tekur 2 tímar at koyra til London. Her búgva umleið 165.000 fólk og býurin er ógvuliga vakur, reinur og rættuliga friðarligur, samanborið við aðrar enskar býir. Býurin er kendur fyri at hava nógv ferðafólk og teir mongu pensionistarnar, ið eru búgvandi her. Hann er ein tann best umtókti feriubýurin í Onglandi – hetta sæðst serstakliga um summarið. Orsøkin til teir mongu pensionistarnar, er, at fólk ið hava búð í tí stressandi høvuðsstaðnum, velja at flyta suður til Bournemouth, tá ið tey pensionerast. Hetta eru mest fólk, ið eru væl fyri fíggjarliga, sum samstundis hevur við sær, at húsaprísurin í Bournemouth er rættuliga høgur. Eini miðal hús kosta umleið tað dupulta, sum eini hús í Tórshavn gera.

Um ta ensku mentanina kann sigast, at tey ganga nógv á pubb. Her eru pubbir á hvørjum horni og tað er teirra vanliga sosiala møtistað – bæði fyri ung sum gomul. Til dømis kann sigast, at tá ið ein hevur føðingardag, bjóða tey vanliga ikki gestunum heim – tey bjóða teimum út á eina pub. Har verður møguliga etið "fish & chips", ið er ein vanlig ensk máltíð og síðani verður drukkið nakrar "pints".

Samanumtikið – er Bournemouth ein ógvuliga góður býur. Her gerst ikki ov kalt um veturin og um summarið er heitt - upp til 30 gradir. Her eru nógvir handlar, eitt gott náttarlív og lekrar strendur. Eg eri glað fyri at hava valt Bournemouth og vildi ynskt, at onnur lesandi frá Føroyum vildu gjørt tað sama.




Søla

## Krani til sølu

Krani, av merkinum Fassi F115.23, til sølu.



Ynskjast nærri upplýsingar, kanst tú venda tær til Boga í Gil, verkførara, á tlf. 343045.

FARMALEIÐIR
Strandfaraskip landsins



i Sosialurin

Lýsið við brúktum bilum





## Útbúgving í samskifti, skipan og leiðslu

**Føroya Læraraskúli og Jydsk Pædagogisk Center skipa í felag fyri útbúgving í samskifti, skipan og leiðslu. Útbúgvingin verður á Føroya Læraraskúla. Sama útbúgvingin verður í Danmark skipað sambært lóg um »Åben uddannelse«.**

Samskifti, skipan og leiðsla er útbúgving fyri øll, sum arbeiða við pedagogiskari leiðslu, t.d. á dag- og bústovnum, í útbúgvingarverkinum, í almennaverkinum o.s.fr.. Útbúgvingin varar 240 tímar, og er skipað í 7 eindir, sum hvør varar 5 dagar. Umleið tríggjar vikur eru millum hvørja eindina. Útbúgvingin er skipað við støðugum skifti millum ástøðiliga og praktiska vitan, og hon endar við próvtøku. Útbúgvingin byrjar umleið 15. januar 2002.

Kostnaðurin fyri allar 7 eindirnar er 9.000,- kr.. Tá er kaffi og døgurði uppií prísinum.

Tey, ið hava áhuga í útbúgvingini, kunnu seta seg í samband við Paula Nielsen, rektara á Føroya Læraraskúla, tlf. 313501 ella 225328 ella við teldubrævi paulini@flsk.fo, at fáa meira at vita.

Tilmelding skrivliga, annaðhvørt við postbrævi ella teldubrævi til Føroya Læraraskúla innan 20. november.

**Føroya Læraraskúli**
Frælsið 20
Postrúm 348
FO-110 Tórshavn
E-mail: flsk@flsk.fo



## Bakaralærlingur

Okkum tørvar ein raskan bakaralæring. Hevur hetta tín áhuga so ring ella skriva til.

**P/F Frants Restorff**
**Tórsgøta 13**
**Postsmoga 41**
**110 Tórshavn**
**Tlf. 311060**

frants restorff



## Postboð á Oyrarbakka

Starv sum postboð á Oyrarbakka er leyst at søkja.

Starvið er lønt í lønarflokki 1/3 sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag.

Arbeiðstíðin fyri postútbering og annað postarbeiði tilsamans er 22 tímar um vikuna.

Skrivlig umsókn verður at senda í seinasta lagi 11. november 2002 til:

**Postverksstjórin**
**Postboks 3009**
**110 Tórshavn**



Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi

Beinleiðis frá framleiðara

Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo

Sosialurin 311820



**Vit hava nú aftur fingið nakrar flugufangarar á goymslu**

**Flugufangarnir eru sera effektivur og verða brúktir bæði privat og á virkjum, fjósum o.a.**



| | | |
|---|---|---|
| ALTI 2100 til rúm støddir uml. 50-80 $m^2$ | prísur einans | kr. 1.895,- |
| ALTI 2138 til miðal stór rúm uml. 100-150 $m^2$ | prísur einans | kr. 2.095,- |
| ALTI 2214 til rúm støddir uml. 200 $m^2$ | prísur einans | kr. 2.995,- |

**SPF. ALTING** tlf. 210 298 fax 318 591

Vit senda um alt landið



## Arbeiðsmaður

Søkt verður eftir røskum arbeiðsmanni, at hjálpa til í bakarínum skiftandi vaktir.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen

HJÁ GUNLEIVI

Tlf. 228838 ella 312161



**Søkt verður eftir lærlingi til eykalutagoymsluna**

**FHS-prógv er ein fyrimunur. Hevur hetta tín áhuga, send eina skrivliga umsókn til:**

**Bilasølan**
**v/ Øssur Johannesen**
**postboks 3192**
**110 Tórshavn**
**Tlf. 315354**